GJALDSTOVAN

**Roknskaparárið 2020 latið aftur**

Gjaldstovan hevur nú latið aftur fyri skrásetingum á roknskaparárið 2020, og roknskaparútskriftir fyri tíðarskeiðið 13-20 vórðu 26. februar 2021 sendar stovnum.

Verða stovnar varugir við týðandi skeivleikar í roknskapum sínum, skulu teir skjótast gjørligt seta seg í samband við Gjaldstovuna fyri at rætta møguligar skeivleikar.

Týðandi skeivleiki merkir, at eksternur roknskaparlesari fær skeiva fatan av roknskapinum, verður skeivleikin ikki rættaður. Flytingar millum innanhýsis útgreiningar í roknskapinum (støð, endamál, verkætlanir) eru ikki týðandi skeivleikar fyri eksterna lesaran.

Harafturímóti eru vantandi skrásetingar av stórum inntøkum og útreiðslum, herímillum skeiv ella vantandi tíðaravmarkan at rokna sum týðandi skeivleiki.